

Lars Emil Johansen. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Vil at Útnorðurlondini umhugsa at banna oljuboring á opnum havi

**Jógvan Hugo Gardar**

01.02.2015 - 09:59

Oljan.fo

Formaðurin í grønlendska landstinginum og næstformaður í Útnorðurráðnum, Lars Emil Johansen, sigur at tað hevur stóran týdning at vit ansa eftir havumhvørvinum og tilfeinginum sum er í havinum. Hetta segði hann, sambært Sermitisaq, á fundinum í Útnorðurráðnum, ið er í grønlendska býnum Aasiaat um vikuskiftið.

Lars Emil Johansen, ið er ein tann royndasti politikkarin í Grønlandi legvi afturat at tað er eitt váðaspæl við framtíðini hjá komandi ættarliðum, um bora verður eftir olju á opnum havi í Arktis.

- Vit liva av tí sum havið gevur, tí er tað eitt váðaspøl við framtíðini hjá komandi ættarliðum, segði Lars Emil Johansen, og vísti á fiskastovnar sum Grønland í dag livir av sum til dømis rækjur, hval, kóp og krabbar.

Hann heldur at øll londini í Útnorðuri eiga at umhugsa um ein eigur at siga nei til oljuboring á opnum havi, og tá meinar hann ikki við bara í Arktis.

- Eg eri ikki ímóti oljuboring, men lat okkum gera tað á landi, segði Johansen, sambært Sermirsiaq